

# NÝGGJ HÚS Í SYÐRUGØTU TIL SØLU

Húsini liggja á Geilargøtu 6. Tey eru bygd í 2007 og eru 280 m² stór.

Húsini eru væl bygd og úr góðum tilfari. Tey eru ljós, hugnalig og liggja sera væl fyri, við framúr góðum útsýni. Húsini eru í tveimum hæddum og báðar eru innrættaðar. Grundstykkið er 528 m², og tað er nærum liðugt gjørt runt um húsini, við túnum og gørðum.

**Prísuppskot: 2,4 mió. / Húsini vera víst fram eftir avtalu.**
***Sí fleiri myndir á www.cre8.fo/pages/hus.php***

**Ring tlf. 441314 ella 217969**

SEV

www.sev.fo

# Kaðal- og linjumeistari til SEV

Eitt starv sum kaðal- og linjumeistari á rakstrardeildini er leyst at søkja til setan skjótast tilber.

**Rakstrardeildin**
Á rakstrardeildini eru 37 starvsfólk í føstum starvi - ein deildarleiðari, tveir kaðal- og linjumeistarar umframt linjuformenn, linjumenn, handverkarar og arbeiðsmenn.

Deildin er skipað soleiðis, at deildarleiðarin og kaðal- og linjumeistararnir eru eitt leiðslutoymi. Deildin er býtt í tríggjar eindir, linjuøkið, goymslan og verkstaðið. Linjuøkið er aftur býtt í fýra eindir, norðurøkið, miðøkið, suðurøkið og byggitoymið.

**Arbeiðsuppgávur**
Kaðal- og linjumeistarin, sum søkt verður eftir, hevur alt elkervið hjá SEV sum arbeiðsøki, men ætlanin er, at hesin fyrst og fremst fer at hava sítt virksemi í norðurøkinum, og uppmøtingarstaðurin kann tískil verða í Skálabotni ella eftir nærri avtalu.

Tú verður við til at leiða og skipa arbeiðið á elkervinum, og saman við deildarleiðaranum gera avtalur við samstarvspartar og hava eftirlit við arbeiðum í gerð. Hetta er eitt sjálv-støðugt starv. Fyrireiking og tilrættislegging av rakstri, viðlíkahaldi og nýgerð á elkervinum eru lykla-uppgávur.

Talan er fyrst og fremst um dag-arbeiði, men starvið krevur, at tú er tøk/ur tá ið á stendur.

**Førleikakrøv**
Tú hevur prógv sum elinnleggjari ella aðra viðkomandi eltekniska útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir á økinum ella á líknandi øki. Tað er eisini eitt krav, at tú hevur koyrikort til vanligan bil.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið og er flokkað sum serfrøðingur I, flokkur VII við reiðuviðbót. Byrjunar- og endalønin er í løtuni netto ávikavíst kr. 25.457,23 og kr. 28.247,07 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi ávikavíst kr. 3.945,87 og kr. 4.378,30 og reiðuviðbótin kr. 1.800,- um mánaðin.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 21. mai 2010 kl. 12.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jón A. Nielsen, deildarleiðara ella Finn Jakobsen, deildarstjóra, báðir á tel. nr. 346800.

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO

# STUÐUL ÚR FELAGSGRUNNI

**Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn.**

Møguleiki verður nú aftur at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn. Grunnafundur verður í juni mánaði, har avgerð verður tikin um veitan av stuðli.

Býarstýrini í Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn seta árliga pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni ella inni á heimasíðu kommununnar www.torshavn.fo. Tað er av týdningi, at hetta umsóknarblað verður nýtt, tá søkt verður, og at svarað verður so gjølla sum til ber.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Anvu Bech, skrivara, telefon 302010.

Umsókn merkt „Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq, Reykjavík og Tórshavn" eigur at vera hjá Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 15. mai 2010.

Grunnurin hevur broytt navn frá „Fællesfond mellem Nuuk-Reykjavík-Tórshavn" til „Fællesfond mellem Nuuk i Kommuneqarfik Sermersooq – Reykjavík og Torshavn".

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# BROYTINGARUPPSKOT

**Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Tórshavn**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 28. apríl 2010 hevur samtykt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um skipan av framtíðar útbyggingarmøguleikum í økinum millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku.

Serstaka byggisamtyktin umfatar ognirnar 384a, 385, 386, 387, 413c, 413d, 414e, 414b og 419, Tórshavn.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu serstøku byggisamtykt-ina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 10. til og við 31. mai 2010, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 21. juni 2010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA